# Gott samskifti krevur vitan



*Bókaverkið hjá Hanusi Kamban í trimum bindum um skaldið Janus Djurhuus, kemur nú í danskari útgávu. Í løtuni fæst Hanus við at gera sendingar um bróðir Janusar, Hans A. Djurhuus*

*(Mynd: Dagfinn Olsen)*

**Hanus Kamban gav í 1994, 95 og 97 út út bók í trimum bindum um skaldið J.H.O. Djurhuus. Hesar koma nú út á donskum. Kona Hanus hevur umsett og forlagið Odense Universitetsforlag gevur út**

BÓKMENTIR
*Dagfinn Olsen*

Bøkurnar, sum Hanus Kamban skrivaði um ævisøgu Janus Djurhuus, koma nú út á donskum. Komið er væl áleiðis og væntandi koma bøkurnar, sum á donskum eru í tveimum bindum, út í oktober.

- Tað var altíð ein hugsan, at bøkurnar skuldu koma út á norðurlendskum máli, t.d. donskum, sigur Hanus Kamban, tá vit hitta hann til eitt prátt um útgávuna.

Kona Hanus hevur umsett. Ætlanin var at hava eina stytta útgávu, men hetta vísti ikki at bera til.

- Hetta var ógjørligt. Tað vísti seg, at bókin er skrivað so, at partarnir grípa inn í hvønn annan. Tí hevði tað at stytt hana, verið sum at taka klípur úr einum garði, sigur Hanus.

## Áhugi

Tann stóri spurningurin er altíð, tá ein situr í Føroyum, um nakað útlendskt forlag hevur áhuga í tí ein fæst við.

- Forløg í øðrum londum hava ongar fortreytir fyri at vita nakað um tað, ið kemur úr Føroyum. Tað vísti seg, at Odense Universitetsforlag hevði áhuga í at geva bøkurnar um Janus út. Forlagið hevur givið út nógv vísundaligt tilfar og hevur eisini tradition fyri at geva út tilfar úr smærri londum, í hvussu er Føroyum. Tað havi eg sæð, tí nógv er givið út á forlagnum viðvíkjandi Føroyum, sigur Hanus Kamban.

## Vakur prentlutur

- Arbeiðið við føroysku útgávuni byrjaði í desember í fjør og er komið væl ávegis. Møguliga verður prentað í hesum mánaðinum og væntandi kemur bókin út í oktober, greiðir Hanus Kamban frá.

Á donskum verður bókin í tveimum bindum, men verður tó lík føroysku útgávuni. Forlagnum dámdi væl føroysku útgávuna, og metti hetta vera vakran prentlut. Tí er avgjørt at nýta útgávuna sum fyrimynd.

- Myndatilfarið er minkað og tað dámar mær væl, tí partur av myndatilfarinum í føroysku útgávuni, vendir sær til føroyska lesaran, sigur Hanus.

## Nýggj niðurstøða

Tó er ein stórur munur á útgávunum.

- Eg hevði ein epilog við, sum eg ongantíð var heilt nøgdur við. Nú havi eg skrivað hetta, sum eitt slag av niðurstøðu. Hetta er heilt annar tekstur, sigur Hanus Kamban.

Hetta er skrivað sum sálarlýsing av høvuðspersóninum, støða hansara til mentan og politiska gongd í hansara tíð. Eisini kemur Hanus inn á gongdina eftir deyða Janusar og fram til dagin í dag, eisini fullveldi. Mett verður um, hvønn týdning Janus og hugsanir hansara hava fyri okkum í dag og fyri gongdina.

- Eg havi eisini viðgjørt yrkingarnar formilga, bókmentasøguliga og komið verður inn á høvuðshugsanirnar í yrkingunum.

Sum heild er meira av Hanusi Kamban í hesum tekstinum, enn í epiloginum í føroysku útgávuni, har talan meira var um leysar hugleiðingar.

## Fortreytir og innlit

Tað sum er spennandi er, at norðbúgvar eru lítið upplýstir um, hvat fyriferst í smærru londunum. T.d. eru fortreytir hjá dønum ikki til staðar at tosa um føroyska mentan og politikk, tí teir hava einki innlit, sigur Hanus Kamban, sum tó nevnir okkurt undantak, t.d. Uffa Elleman Jensen, ið hann metir, tykist hava innlit.

- Vit eru í tí støðu, at vit vita nógv um hini, sigur Hanus.

- Vanligt er at síggja, at Føroyar og føroyingar verða mettar sum eksotiskar ella eru vit sera oyðslutir, tað er eingin millumvegur, metir Hanus.

Í bókini verður greitt frá um samskiftið og samstarv millum Føroyar og Danmark og Føroyar og onnur lond. Har er mentanarsøga og politisk søga. Sumt, ella tað mesta, hevur ikki verið á prenti áður í Føroyum ella Danmark, sigur Hanus.

Hann heldur eisini vera áhugavert, at portrett eru av persónum, sum úti í heimi eru púra ókendir.

- Til dømis V.U. Hammersheimb, faðirin at skriftmáli okkara, stóra málfrøðinginum Jakob Jacobsen, har eru háskúlamenninir og Jákup Dahl, sigur Hanus.

Eisini eru persónar, sum eru nakað kendari, t.d. Heðin Brú, Christian Matras og William Heinesen.

Tað er 20. øld, ið er verður viðgjørd, fram til deyða Janusar, men í epiloginum verður farið fram til dagin í dag.

- Bókin verður vónandi stuðul í samskiftinum millum Føroyar og Danmark og Føroyar og Norðurlond, sigur Hanus og leggur afturat, at gott samskifti krevur innlit.

## Sjónvarp um Hans A. Djurhuus

Danska útgávan av bókini verður eisini at fáa í føroysku bókabúðunum.

Tað er ikki hvønn dag, at føroyskar bøkur koma á øðrum málnum, enn føroyskum, men tað er alt vanligari nú.

Hanus sigur, at hetta eisini kemur av, at forløg fáa styrk frá grunninum Nordbok, tá tey geva út týðingar.

Hanus, sum í løtuni býr niðri, er fyri mentanardeildina í Svf í gongd við 3 sendingar um Hans A. Djuruus, ið sum kunnugt er bróðir Janus Djurhuus. Áaastovubrøðurnir, sum teir verða róptir, taldust báðir millum mætastu skøld í farnu øld og varðar teirra standa enn.

Fyrsta sending um Hans A. Djurhuus verður send á Mikkjalsmessu, 29. september, sigur Hanus.

- Hetta eru sendingar á 45 minuttir og er heta lýsing av menniskjanum og skaldinum Hans A. Djurhuus, sigur Hanus Kamban.


Í Býin
- hvønn hósdag

MASSAGE
1-årig uddannelse
(ca. en weekend om måneden)
Starter: den 25. til 26. august 2001
Sted: Tórshavn
Pris: 1.200 kr./weekend
Jens Melgaard
(lærer, massør og afspændingspædagog, DAP
ring efter program tlf. 0045 38 71 72 93




# Skal verða léttari at fáa heilivág

**Nes Sóknar Sjúkrakassi mælir til at gera tað léttari hjá fólki, sum eru bundin at einum reseptheilivági, at fáa hendan heilivágin á apotekunum. Sjúklingar, læknar, sjúkrakassar og apotek skulu ikki troyttast av fleiri reseptum um mánaðin fyri sama heilivág**

HEILIVÁGUR
*Eyðun Klakstein*

Nes Sóknar Sjúkrakassi tekur nú stig til, at sjúklingar, sum eru bundnir at einum ávísum heilivági í langa tíð, skulu hava léttari við at fáa hendan heilivági.

- Tað er heilt órímiligt, at fólk skulu venda sær til læknan fleir ferðir um mánaðin fyri at fáa resept til ein heilivág, sum tey hava brúkt hvønn dag í fleiri ár, sigur Hans Pauli Højgaard, formaður í Nes Sóknar Sjúkrakassa.

- Tað er púra vanligt, at fólk brúka fleiri tímar frammanfyri telefonina fyri at koma í samband við læknan hjá sær, so tey kunnu fáa neyðugu reseptina. Hetta troyttar fólk ómetaliga nógv, og tað er eisini strævið hjá læknunum. Tað eigur at bera til at gera eina meira lagaliga skipan, so fólk kunnu fáa meira heilivág útskrivaðan í senn, heldur Hans Pauli Højgaard.

Hann hevur sum formaður í Nes Sóknar Sjúkrakassa lagt eitt uppskot fyri aðalfundin hjá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, har hann mælir til, at Meginfelagið fer at virka fyri eini meira lagaligari skipan.

## Nýggja skipan

Skal ein broyting gerast, so má tað millum annað gerast í samráðingum við kommunulæknarnir, tí tað eru teir, sum gera av, hvussu nógvan heilivág ein sjúklingur skal hava í senn.

Tað er vanligt, at læknarnir ikki vilja lata einum fólki heilivág fyri longri tíð á somu resept. Hetta gera teir, so teir kunnu fylgja gongdini hjá sjúklinginum.

- Vit mæla ikki til, at læknarnir verða tiknir á ræði, men heldur, at ein meira hóskandi skipan verður gjørd, so tað verður léttari hjá øllum pørtum. Tað hevði til dømis uttan iva borið til at gjørt eina telduskipan, har læknar, sjúkrakassar og apotek kundu verið við, heldur Hans Pauli Højgaard.

## Øll líða

Hann sigur, at orsøkin til uppskotið hjá sjúkrakassanum í Nes Sókn er, at fólk í økinum hava gjørt vart við seg. Hann sigur seg kenna nógvar søgur um fólk, sum hava stórt stríð av at fáa reseptheilivágin, sum tey hava fyri neyðini.

- Ein maður, sum hevði fingið diabetis, varð til dømis noyddur at ringja eina ferð um vikuna til læknan fyri at fáa resept til insulin, sigur Hans Petur Højgaard.

- Tað eru nógvar aðrar líknandi søgur, og tær vísa eina órímiliga skipan, har bæði læknar, sjúklingar og sjúkrakassar eru taparar. Sjúklingar hava óneyðugt stríð fyri at fáa heilivág, læknar verða órógvaðir óneyðuga nógv, og umsitingin hjá sjúkrakassunum kostar meira enn neyðugt.




*Sjúklingar hava óneyðugt stríð fyri at fáa heilivág, læknar verða órógvaðir óneyðuga nógv, og umsitingin hjá sjúkrakassunum kostar meira enn neyðugt. Tí má skipanin broytast, heldur formaðurin í Nes Sóknar Sjúkrakassa*
*Myndin er av apoteksútsøluni í Runavík*

## Aðalfundurin taka støðu

Aðalfundurin hjá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya verður 23. februar, og tá kemur uppskotið frá Nes Sóknar Sjúkrakassa til viðgerðar.

Um aðalfundurin tekur undir við uppskotinum, verður tað upp til nevndina í Meginfelagnum at arbeiða fyri málinum.

Formaður í Meginfelag Sjúkrakassa Føroya er Tórbjørn Mikkelsen í Havn, meðan Jórun Gaardbo Olsen er næstformaður.

# Skiparin tók við bót

**Skiparin á Rasmusi Effersøe bað sjálvur um, at málið varð loyst við sektauppskoti**

ÓLÓGLIG VEIÐA

Málið um trolveiðuna hjá Rasmusi Effersøe, har skipið royndi við ov smáum meskum, er avgreitt. Skiparin hevur tikið við eini bót upp á 40.000,- krónur.

Tað var skiparin sjálvur, sum undir avhoyringunum á Tvøroyri í gjár, bað um, at málið varð loyst soleiðis, sigur Linda Hesselberg, politifulltrúi á Fútaskrivstovuni í Havn.

Fútin kom síðan við upphæddini, sum skiparin góðtók. Hann hevði frammanundan viðgingið, at meskarnir vóru í so trongir.

Rasmus Effersøe fór á Tvøroyri sum avtalað, og tá bótin er goldin, er klárt hjá skipinum at fara aftur til fiskiskap.

Hald varð lagt á tann spildurnýgja posan við teimum ov smáu meskunum.

**ej**



*Skiparin á Rasmusi Effersøe tók við sektaruppskoti frá fútanum*

*Mynd: Edvard Joensen*


